# Skúvoyar bygd

## Skúvoyar kommuna

**Byggisamtykt**

# Innihaldsyvirlit


§ 1 - Endamál 3

§ 2 – Heimild og avmarking 3

§ 3 - Nýtsla økisins og ásetingar í økjunum 3

*Stk. 2.* Øki A: Sethús 3

Stk. 3. Øki B: Almennir stovnar, mentan og líknandi 4

*Stk. 4.* Øki D: Vinnuøki 4

*Stk. 5.* Øki E: Havnaøki 4

*Stk. 6.* Øki F: Landbúnaður 4

*Stk. 7.* Øki G: Frítíðar- og summarhús 5

*Stk. 8.* Øki H: Neyst 5

§ 4 – Aðrar ásetingar 6

§ 5 – Bygging, ið er 6

§ 6 – Byggimyndugleiki og átalurættur 6

§ 7 – Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar í henni 6

## § 1 - Endamál

*Stk. 1.* Endamálið við hesi byggisamtykt er at skipa bygging í Skúvoy.

## § 2 – Heimild og avmarking

*Stk. 1.* Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verða hesar ásetingar at galda fyri bygdina Skúvoy, ið hoyrir til Skúvoyar kommunu.

*Stk. 2.* Økið, ið byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali.

## § 3 - Nýtsla økisins og ásetingar í økjunum

*Stk. 1.* Økið verður býtt sundur í eindirnar A, B, D, E, F, G og H, sum sýnt er í viðfesta kortskjali, og verða økini kannað endamálunum í stk. 2-8.

### *Stk. 2.* Øki A: Sethús

a. Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. roknað til eitt húski til hvørja eind. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýling og ikki eru meir enn 50% av byggingini.
b. Grundøkini skulu vera í minsta lagi 400 fermetrar til støddar fyri sethús. Byggimyndugleikin kann tó í serligum førum loyva bygging á grundøkjum niður í 300 fermetrar fyri sethús (einhúskishús) og 200 fermetrar fyri hvønn partin av tví-, ketu- ella raðhúsum.
c. Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggimyndugleikin hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúning annars er tryggjað sambært treytum frá kommununi.
d. Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.
e. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tví-, ketu- ella raðhús.
f. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti, og mugu ikki vera hægri enn 6 metur til hægsta punkt við útvegg og 9 metur til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
g. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi veða 6 metur til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 metur.
h. Er hægsta punkt til útvegg hægri enn omanfyri ásett undir litra f og g, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn mest loyvda hæddin.
i. Hóast ásetingarnar í litra a-h, kann byggivaldið loyva at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, so at tey hóska til nútímans nýtslu sum sethús.

## Stk. 3. Øki B: Almennir stovnar, mentan og líknandi

a. Økið verður lagt av til almennar stovnar, undirvísing, mentanarlig-, átrúnaðarlig-, heilsulig endamál og tílíkt.
b. Innan fyri økispartarnar mugu einans vera gjørd slík virki og bygningar, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.
c. Bygningar kunnu einans verða bygdir eftir eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

## *Stk. 4.* Øki D: Vinnuøki

a. Økið verður lagt av til ídnaðar-, matvøru- og handilshús, verkstøð, verksmiðjur, bjargingar- og tilbúgvingarhallir, renovatiónsøki umframt annað tænastuvirksemi.
b. Einstøku grundøkini mugu ikki vera smærri enn 750 fermetrar.
c. Byggjast má ikki nærri marki enn 5 metrar.
d. Á hesum økinum er ikki loyvt at innrættað bústaðir.

## *Stk. 5.* Øki E: Havnaøki

a. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu, samferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.
b. Byggistigið fyri havnarøkið sum heild, má ikki fara upp um 0,3.
c. Eingir bygningar ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 metur.
d. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri byggitromu enn 15 metur ella nærri aðrari bygging enn 5 metur.
e. Á hesum øki er ikki loyv at innrætta bústaðir.
f. Lendið á hesum øki kann einans leigast og ikki avhendast.

## *Stk. 6.* Øki F: Landbúnaður

a. Økið verður lagt av til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
b. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traðar- og jarðarbrúk at gera.
    1. Tó er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey hóska til nútímans nýtslu sum sethús.
    2. Eisini er loyvt at gera bygningar, sum eru neyðugir fyri alment gagnligar veitingar, so sum ravmagns- og vatnveitingar, burturbeiningar av skarnvatni, telesamskiftisloysnir, veghald o.a.
    3. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, ið ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í øki F.
c. Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.
d. Í sambandi við bygging í øki F treytar kommunan sær rætt til at seta krøv til skap og staðseting.

e. Tá ið talan er um bygging eftir hesi grein, skal frágreiðing fylgja við umsóknini, og er byggiloyvið treytað av, at kommunustýrið samstundis góðkennir frágreiðingina. Frágreiðingin skal í minsta lagi fevna um:
   1. Grundarlagið fyri virkseminum
   2. Hvussu rakstur verður skipaður
   3. Hvat slag av djórahaldi talan er um
   4. Hvussu stórt talið av djórum verður
   5. Burturbeiningarskipan av tøðum

f. Verkløg sum eitt nú grótbrot o.t., verða at fremja við serstakari byggisamtykt.

### *Stk. 7.* Øki G: Frítíðar- og summarhús

a. Økið verður lagt av til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.
b. Økið skal einans brúkast til frítíðar- og summarbústaðir og kann ikki brúkast til heilársbústað.
c. Grundøkini skulu vera í minsta lagi 200 fermetrar til støddar.
d. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti.
e. Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.
f. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.
g. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í einari hædd umframt nýttum lofti, og mugu ikki vera hægri enn [3 metur til hægsta punkt við útvegg og 5,5 metur til mønuna].
h. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi [vera 3 metur til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 4,5 metur].
i. Er hægsta punkt til útvegg meira enn omanfyri undir litra g og h, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn mest loyvda hæddin.

### *Stk. 8.* Øki H: Neyst

Hetta økið skal bara brúkast til neystabygging til bátar.

## § 4 – Aðrar ásetingar

*Stk. 1.* Fyri alla bygging eru reglurnar í tí til ein og hvørja tíð galdandi Bygningskunngerð galdandi.

## § 5 – Bygging, ið er

*Stk. 1.* Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

*Stk. 2.* Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## § 6 – Byggimyndugleiki og átalurættur

*Stk. 1.* Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Skúvoyar bygdaráð einsamøllum.

*Stk. 2.* Byggimyndugleikin kann veita triðjaparti heimild at útinna sínar uppgávur sum byggimyndugleiki sambært hesi byggisamtykt og avgreiða byggimál í hesum sambandi.

## § 7 – Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar í henni

*Stk. 1.* Smávegis fravik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann bygdaráðið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt bygdaráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

Soleiðis samtykt av bygdaráðnum í Skúvoyar kommunu hin 23-5 2023

Poul Ásmund Tórarenni

**Poul Ásmund Tórarenni, borgarstjóri**

Jákup A. Thomsen

**Jákup Andrias Thomsen, varaborgarstjóri**

H Jensen

**Harry Jensen, bygdaráðslimum**


SKÚVOYAR KOMMUNA
HEITI
UPPSKOT TIL BYGGISAMTYKT
UNDIRHEITI
EFTIR BROYTING
MÁT
1:2500
GÓÐKENT
08.02.2023
Teknlýsing
Øki A - Sethús
Øki B - Almennir stovnar/mentan
Øki D - Vinnuøki
Øki E - Havnaøki
Øki F - Landbúnaður, alt øki innangarðs
Øki G - Frítíðar- og summarhúsøki
Øki H - Neystaøki
Beinursvegur
Brestisvegur
Einarsvegur
Sigmundarvegur
112
55a
29b
102a
N

| SKÚVOYAR KOMMUNA | | | |
|---|---|---|---|
| HEITI | UPPSKOT TIL BYGGISAMTYKT | | |
| UNDIRHEITI | EFTIR BROYTING | | |
| MÁT | 1:1000 | GÓÐKENT | 08.02.2023 |

*Teknlýsing*

- *Øki A - Sethús*
- *Øki B - Almennir stovnar/mentan*
- *Øki D - Vinnuøki*
- *Øki E - Havnaøki*
- *Øki F - Landbúnaður, alt øki innangarðs*
- *Øki G - Frítíðar- og summarhúsøki*
- *Øki H - Neystaøki*



| SKÚVOYAR KOMMUNA | | | |
|---|---|---|---|
| HEITI | UPPSKOT TIL BYGGISAMTYKT | | |
| UNDIRHEITI | ÁÐRENN BROYTING | | |
| MÁT | 1:2500 | GÓÐKENT | 08.02.2023 |



| SKÚVOYAR KOMMUNA | | | |
|---|---|---|---|
| HEITI | UPPSKOT TIL BYGGISAMTYKT | | |
| UNDIRHEITI | ÁÐRENN BROYTING | | |
| MÁT | 1:1000 | GÓÐKENT | 08.02.2023 |

